Henrik Old
løgtingsmaður

Nr. 42/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um virking av laksi, sum er aldur í Suðuroy, settur landsstýrismanninum við vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hevur Bakkafrost fingið undantaksloyvi til at virka laksin, sum er aldur í Suðuroynni, aðrastaðni?

2. Um so er, hvør hevur givið undantaksloyvi og við hvørjari grundgeving?

3. Metir landsstýrismaðurin, at treytirnar um undantøk í alilógini og kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy eru fylgdar?

Viðmerkingar:
Suðurrás visti í gjár at siga, at 40 fólk eru uppsøgd á kryvjivirkinum hjá Bakkafrosti í Vági. Undanfarna samgonga ásetti við lóg, at laksur frá alibrúkum á alifirðum í Suðuroy skal virkast í Suðuroy. Lógin ásetir kortini, at landsstýrismaðurin skal geva undantaksloyvi frá krøvunum, tá talan er um sjúku og sjúkufyribyrgjandi tiltøk, og sambært kunngerð kann Aliumsitingin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni veita undantak orsakað av umstøðum, sum loyvishavari ikki hevur ræði á, og sum tað ikki frammanundan ber til hjá loyvishavara at forða fyri.

Sum skilst í Kringvarpinum í gjárkvøldið er grundgevingin fyri, at laksurin nú er fluttur av oynni, at arbeiðsorkan skal brúkast til fulnar, tá laksurin er komin á tøkuvekt. Sambært lóg og kunngerð um undantøk, er hetta neyvan nóg góð grundgeving.

Endamálið hjá undanfarnu samgongu við at áseta kravið um, at fiskurin skal virkast í Suðuroynni, var at tryggja støðug arbeiðspláss í oynni. Suðuroyingar hava av góðum grundum ikki somu møguleikar sum onnur at ferðast millum bústað og starvsstað, og tí er alneyðugt fyri trivnaðin, at støðugt arbeiði er í oynni. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 13. januar 2020

Henrik Old